# Venja til ólavsøkukonsertina

**Ólavsøkan nærkast og somuleiðis ólavsøkukonsertin, sum í ár er fyri 20 ferð. Og bólkarnir eru byrjaðir at venja til koncertina hóskvøldið og fyrireikarin reikar Havnina runt at savna síðstu endarnar, so alt at enda klappar. Ólavsøkukonsertin hevur fingið skeinkiloyvi.**



TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinne@sosialurin.fo*

Ólavsøkufyrireikingarnar byrja av álvara at merkjast og síggjast í høvuðsstaðnum. Menn heingja ljósperur upp og ymsastaðni hoyrist tónleikur út ígjøgnum opnar gluggar. Ein skal ikki ganga longi í býnum, áður enn ein rennur seg í ólavsøkufyrireikingar.

Í morgin stukku vit inn á gólvið í Skansastovu yviri vi Strond í Havn. Har vandi Eyðun Nolsøe og manning hansara. Eyðun er eitt av nøvnunum á plakatini til ólavsøkukonsertina í ár.

Tygara útsendi slapp innar at lurta og at taka nakrar myndir og lata sum um, at hann ikki var á staðnum, tí menn taka venjingarnar í álvara. Tað sást og hoyrdist.

Hesa løtuna, vit stukku inn á gólvið (og lótu sum um vit ikki gjørdu tað fyri ikki at órógva), var tað nokk eitt nýtt lag, ið var á skránni. Men Eyðuni so líkt. so tók tað bert lítla løtu, til ein ivaðist, um ein hevði hoyrt lagið áður. Eitt lag, ið skjótt festir seg.

Eyðun hevur savnað góða manning afturat sær. Leivur Thomsen á guitar, Rógva á Rógvu, trummur, Arnold Ludvig á bass og Pætur við Keldu tangentar. Á loftinum hoyrdust eisini tónar og har vandi blásaraparturin av bólkinum hjá Eyðuni. Tróndur Enni og Hans Petur í Brekkunum vóru í holt við at seta síðstu tónarnar á pláss, ið skulu blásast afturvið løgunum hjá Eyðuni, tá hann fer á pall á ólavsøkukonsertini, sum verður fyri 20. ferð í ár.

Ein høvuðsfyrireikari av konsertini hevur í mong ár verið Kaj Johannesen. Eisini hann hittu vit í morgun, meðan hann reikaði Havnina runt fyri at savna leysar endar í samband við konsertina, sum í ár hevur 20 ár á baki. Júst strongdur var hann ikki, men heilt uttanfyri blaðmannaprátið duldi hann tó ikki, at tað er strævið starv at fáa so stórt tiltak at rigga, so at alt í síðsta enda klappar.

Eitt av nøvnunum á konsertini í ár er Mezzoforte úr Íslandi. Teimum royndu vit í morgun at fáa fatur í, men tað eydnaðist ikki reiðiliga. Tó so, tí eina liminumí bólinum eydnaðist at fáa í telefonhornið, men hann var staddur í Spania, tá hann tók telefonina og vildi tí so fegin at onkur annar í bólkinum skluldi svara.

Ætlanin var tó bert at spyrja, hvat vit kunnu vænta okkum av Mezzoforte á Ólavsøku. Hesum bólki av íslendskum tónleikaúrmælingum, sum í áttatiárunum hugtók allan heim og sum eisini løgdu leiðina fram við á Tórshavnar Jazz Fólka og Bluesfestival einaferð síðst í áttatiárunum. Tað størsta innan íslendska tónleikavinnu, innan Bjørk bygdi sær stórar tónleikavarðar.

Men so mikið fingu vit tó burturúr telefonsamrøðuni við íslendingin í Spaniu, at Mezzoforte gleðir seg at koma til Føroya og tað gera teir í morgin, mikudag.

Tað kann tykjast, sum vendir konsertin í ár sær til eina nakað eldri fjøld, enn ungu fjøldina, ið vanliga hevur vitjað ólavsøkukonsertina seinnu árini. Konsertin hevur eisini fingið skeinkiloyvi.

Rundferðin í Havnini ein týsmorgin ein dag, har alt er í ferð við at vakna , nú ólavsøkan nærkast, er av.







Tíðaærtlan til 20indu ólavskukonsertina 27. juli Kommunuskúlagarðinum

| | |
|---|---|
| 20:00-20:10 | PoP-ToP Vinnarin |
| 20:15-20:25 | Beatboy |
| 20:30-20:55 | Crawling Blue |
| 21:05-21:35 | Maria & Gunnar Guttesen |
| 21:40-22:00 | Kristleif Zachariasen |
| 22:10-22:40 | Hgni Lisberg |
| 22:45-23:00 | Lena Anderssen |
| 23:10-23:45 | Eyun Nolse Band |
| 23:50-00:00 | Marius(solo) |
| 00:00-00:20 | TJALDI: “StórBandittarnir” |
| 00:20-01:35 | Mezzoforte |
| 01:45-02:15 | EGR2PLZ |
| 02:25-02:50 | Dreams |
| 03:00-03:25 | Side-Effect |
| 03:25-04:00 | Mc-Hr |

Tíðirnarnar eru vegleiðandi

Tjaldinum spæla Brekku Brothers, Tórshavnar Big Band og Tima Seppala.

## Eingin ólavsøka uttan Ævintýraferðina

**Sjónleika- og tónleikabólkurin Ævintýraferðin framførir sín nýggja leik ”Alt ber til” allar dagarnar á ólavsøku fyri børnum og vaksnum í tí nýggja gula kommunuskúlanum í Kongagøtu.**

Barnaleikur og útileikur er seinnu árini vorðin partur av ólavsøkuni og so er eisini í ár.

Við sjónleiki og tónleiki og saman við børnunum fara Dánjal Kagadingdingkagadingdingkagadum, Búi Sibbidibbidimdimdubadabadamog Sofía Sofía bingbangbong eina ferð inn í eitt ævintýraland. Eitt ævintýraland har alt ber til.

Í tíðindaskrivi siga leikararnir, at; tað stuttliga við ævintýraferðini er, at har sleppur tú at spæla við, syngja við, hjálpa okkum at loysa gátuna og royna tey stuttligu ljóðførini eftir sýningina. Eisini fær tú møguleikan at ogna tær spildurnýggju fløguna, ”Alt ber til”.

Hetta er triðju ferð Ævintýraferðin er á ferð á ólavsøku og hesaferð verður ferðin sjálvandi nýggj, bæði søgugongdin og tónleikurin. Leikurin hevur ein kláran reyðan tráð og eitt greitt innihald. Tó er leikurin gjørdur broytiligur og fleksibul við tí fyri eyga at draga børnini inn í leikin so nógv sum gjørligt, uttan at reyði tráðurin verður kvettur.

Sagt verður, at sjónleikur og serstakliga tónleikur, sum børn sjálv eru við til at skapa, letur upp fyri loynikrókum hjá børnum og fær tey at mennast.

Hví ikki royna tað á ólavsøku?, spyrja leikararnir.

- Vit vóna at sleppa at framføra fyri øllum børnum og barnsligum sálum á ólavsøku og gleða okkum at síggja tykkum, siga leikararnir.

Leikurin verður vístur hesar dagarnar:

Hósdag 27. juli kl. 16.00
Ólavsøkuaftan kl.15.00 & kl.17.00
Ólavsøkudag kl.15.00 & kl.17.00
Sunnudag 30. juli kl.16.00
Ævintýraferðin – alt ber til.

## Ætting

Í samrøðu við Gunnleiv Dalsgarð í blaðnum í gjár um sveisarar úr Póllandi, sum koma til landið at arbeiða fyri lægri løn enn føroyskir handverkarar, verður nævnt, at tað sum fær formannin í Starvsmannafelagnum at taka orðið er ein oddagrein, har ynskt verður tillukku. Í greinini verður sagt, at oddagreinin ynskir Skipasmiðjuni tillukku. Hetta er ikki rætt, tí oddagreinin ynskir fakfeløgum tillukku og er tað m.a. hetta, ið fær Gunnleivur Dalsgarð at taka orðið. Vit biða lesaran orsaka villuna.

**-blðm-**